## Apple í stórum vøkstri

Fyrst iPod og nú iPhone. Apple er við fullari ferð á veg aftur sum ein av heimsins KT-risum. Júst kunngjørdi hálvársroknskapurin vísir, at umsetningurin í næsta ársfjórðingi í ár sýndi ein vøkstur upp á 73%. Ikki minst takkað verið iPod og nýggju iPhone. Men eisini innan telduøkið er talan um vøkstur. Apple hevur seinastu tríggjar mánaðirnar selt 1,76 milliónir teldur, og tað er ein vøkstur á 32%.



## Myndir hjálpa Danmark

Nýggjar satellitmyndir gera støðuna hjá Kanada veikari í stríðnum móti Danmark um oynna Hans Ø í smala sundinum millum Grønland og Ellesmere Island. Kanadisku myndugleikarnir ásanna nú, at altjóða marknaðarlinjan gongur beint gjøgnum Hans Ø og ikki eystanfyri, sum teir annnars hava hildið fast við. Bæði Danmark og Kanada krevja yvirvaldsrætt yvir oynni, tí stórt náttúruríkidømi finst í umráðnum. Talan er um olju, gass og miniralir. Ósemjan stakk seg upp í 2005, og síðani hava londini samráðst um málið, veit Børsen at siga

# Smádrongur doyði í ferðsluvanlukku

**Ein fimmára gamal drongur lat lív í eini ferðsluvanlukku í Kunoyartunlinum mikukvøldið**

FERÐSLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Ferðsla slapp ikki ígjøgnum tunnilin ein góðan tíma eftir vanlukkuna, tí bilurin forðaði fyri hesum*
*Mynd: Høgni Thomsen*

Í bilinum var umframt fimmára gamla drongin, bert førarin. Sjúkrabilar, sløkkilið og løgregla kom á staðið, og bæði drongurin og maðurin vórðu fluttir á sjúkrahús. Smádrongurin fekk so álvarsamar løstir, at hann doyði av hesum kundu tey staðfesta á Klaksvíkar sjúkrahúsi eftir vanlukkuna.

Maðurin, sum var í fimmtiárunum, sat fastkleimdur í bilinum og fekk álvarsaman skaða, og varð tískil fluttur á Landssjúkrahúsið alt fyri eitt.

### Ógreitt hví óhappið hendi

Tað var kl. 17.24 at løgreglan fekk fráboðan um vanlukkuna, sum hendi fáar minuttir frammanundan inni í Kunoyartunlinum. Talan var um ein vanligan persónbil, sum kom úr Kunoy. Umleið 1500 metrar inni í tunlinum frá tunnilsmunnanum móti Klaksvík brestur bilurin inn í veggin høgrumegin, og sleingist hann nakrar ferðir frá einum veggi í hin, áðrenn hann steðgar 50 metrar longur frammi. Tað upplýsir løgreglan í Klaksvík.

Har visti tey tó á middegi ikki at siga hví óhappið hendi, ella hvussu nógva ferð bilurin hevði tá. Men løgreglan hevur gjørt kanningar, sum millum annað skulu staðfesta nøkur av hesum tingum. Fyri evstamark okkara var støðan hjá manninum framvegis ógreið, og tískil hevði heldur ikki borið til hjá løgregluni at avhoyra hann.

# Traditionen tro...

**Áttanda árið á rað skipar Lions Club Tórshavn fyri listaframsýning á ólavsøku, har bæði kend og minni kend listafólk sýna fram verk síni. Sum vanligt, fer allur ágóðin til vælgerandi endamál. Framsýningin er opin báðar ólavsøkudagarnar og mánadagin**

FRAMSÝNING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tilsamans 37 listafólk sýna hesa ferð fram yvir 130 listaverk á stóru listaframsýningini, sum Lions Club Tórshavn skipar fyri í Müllers Pakkhúsi. Talan er sum vanligt um eina sølu-framsýning, hvørs endamál er at útvega pening til vælgerandi endamál, og allur ágóðin av bæði listaverks- og atgongumerkjasølu fer til slík endamál.

Framsýningin umboðar myndlist í orðsins breiðasta týdningi, tí við á framsýningini eru nógvir olju- og akrylmálningar, umframt vatnlitsmyndir, kopar- og linoleumsprent, tekningar og standmyndir. Somuleiðis er stór breidd í skaranum av listafólkum, tí talan er bæði um kend og minni kend listafólk, ið sýna fram verk síni.

Hesa ferð hevur Lions Club Tórshavn gjørt av, at ágóðin skal fara til kaféborð, -stólar, videokanón og lørifti til Havnar Sjónleikarfelag. Í dagtímunum verður Sjónleikarhúsið í Havn nógv brúkt til skeið, fundir og ráðstevnur, og tí vil felagið betra møguleikarnar og karmarnar á staðnum til hesi endamál.

### Málningur at vinna

Atgongugjaldið til framsýningina í Müllers Pakkhúsi er 50 krónur, og hvør gestur fær útflýggjaða eina skrá yvir framsýningina. Á hvørja skrá er prentað eitt nummar, og tá framsýningin endar mánakvøldið, verður drigið millum allar skráirnar um ein málning, sum Hergerð Joensen í Havn hevur málað.

Hetta er áttanda árið á rað, at skipað verður fyri hesi listaframsýning, sum síðani 2000 hevur verið fastur táttur í mongu mentanartilboðunum í høvuðsstaðnum á ólavsøku. Alsamt fleiri ólavsøkugestir hava seinnu árini valt at lagt leiðina fram við Müllers Pakkhúsi á ólavsøku, og tað vóna fyrireikararnir eisini, at mong gera hesa ferð.

Lions Club Tórshavn takkar fyri góðan stuðul frá Tórshavnar býráð, sum leggur hølið til framsýningina, og Tryggingarfelagnum Føroyar, sum hevur stuðlað á annan hátt. Framsýningin er opin ólavsøkuaftan og ólavsøkudag frá klokkan 14 til 20, og dagin eftir ólavsøku, mánadagin 30. juli, er opið frá klokkan 16 til 20.



*Atgongumerkini eru samstundis lutaseðlar, har vinningurin er hendan myndin, sum Hergerð Joensen hevur málað*
*Savnsmynd*